STARVSLÝSING

# Arkitektur til Landsverk

Hevur tú hug at starvast í eini deild í stórari menning, og hevur tú áhuga fyri landsins byggilist, so kunnu vit bjóða tær øðrvísi royndir í einum spennandi og avbjóðandi starvi á bygningadeildini hjá Landsverki.

Vit leita eftir einum virkisfýsnum og skapandi persóni við byggikønari bakgrund at byrja hjá okkum skjótast til ber.

### Høvuðsarbeiðsøkið

Saman við einum vælvirkandi toymi og starvsfeløgum við drúgvum royndum fert tú at vera við í arbeiðinum at greina og raðfesta krøvini til viðlíkahald og bygging av almennum bygningum við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku.

Harumframt skalt tú eisini taka lut í viðgerð av øðrum málum, har bygging og bygningar, landslag og formlist eru partar av viðgerðini. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða spennandi og áhugavert starv innan byggiráðgeving.

### Førleikakrøv

Vit leita eftir fólki við útbúgving sum arkitektur. Vit vilja røkka best møguligum úrslitum, og tí vænta vit, at tú ert arbeiðssamur, dugnaligur og væl skipaður.

Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum og gevur títt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl. Merk umsóknina „Umsókn til bygningadeildina“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella ob@lv.fo

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*






# Lesivegleiðaraútbúgving

**Ein liður í at uppstiga lesingina í fólkaskúlanum**

Hervið verður boðin út eftirútbúgving, ið hevur sum mál at skapa fyritreytir fyri betri lesing í fólkaskúlanum.

Endamálið er at geva lærarum førleika at virka sum vegleiðarar í lesing og skriving á øllum floksstigum í føroyska fólkaskúlanum.

Útbúgvingin verður á Føroya Læraraskúla og byrjar í august 2008. Undirvísingin fevnir um tvey skúlaár og telur 30 ECTS. Útbúgvingin skal vera liðug í seinasta lagi 1. juli 2010.

**Talan verður um 3 lestrareindir:**

- Innlit í lesing og skriving herundir um lesi- og skrivitrupulleikar
- Lesi- og skriviundirvísing
- Eftirmeting og vegleiðing

Hvør lestrareind endar við roynd, sum verður mett av uttanhýsis próvdómara.

Veittur verður tímaniðurskurður 4 t/v í tvey ár og annars aðrar sømdir sambært galdandi reglum hjá MMR.

Útbúgvingin verður skipað sum parttíðarlestur, lutvíst í samstarvi við útbúgvingarstovnar í útlondum. Vit vænta at umsøkjararnir hava læraraútbúgving og minst 2 ára starvsroyndir innan økið.

Lýsing av útbúgvingini er á heimasíðu Læraraskúlans: www.flsk.fo

Nærri fæst at vita hjá Karolinu Matras, lesigranskara á Læraraskúlanum, karolina@flsk.fo, tlf. 220627.

Umsóknir skulu – við viðmæli frá skúlaleiðsluni - sendast til Føroya Læraraskúla, Frælsið 20, FO-100 Tórshavn, og vera Læraraskúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 8. mai 2008.

**Umsóknarblaðið er á heimasíðu skúlans www.flsk.fo**

FØROYA LÆRARASKÚLI